# Tilmæli um 10. flokk



Fólkaskúlaráðið

November

01-01-2016

Tilmæli um 10. flokk – Fólkaskúlaráðið november í 2016

**Inngangur:**
Fólkaskúlaráðið hevur sett sær fyri at lýsa 10. flokk nærri og koma við tilmæli til landsstýriskvinnuna um, hvussu 10. flokkur kann verða skipaður bæði innihaldsliga og bygnaðarliga.

Høvuðsorsøkin til, at Fólkaskúlaráðið hevur valt at viðgera 10. flokk, er, at yvir 60% av næmingunum halda fram í 10. flokki eftir loknan 9. flokk, hóast talan er um eitt skúlaár, ið ikki er kravt. Fólkaskúlaráðið ivaðist í, um verandi skipan við 10. flokki er nøktandi. Undirvísingarligu tilboðini, sum hesir næmingar fáa, eru sera ymisk kring landið. Hetta kemst serliga av, at næmingatalið í flestu skúlum, ið hava 10. flokk, er ov lágt til at kunna bjóða næmingunum viðkomandi og fjølbroytt tilboð, sum ætlanin var við 10. flokki.

Harumframt hava miðnámsskúlarnir, sum taka ímóti 10. floks næmingum víst á í almenna rúminum, at førleikarnir hjá hesum næmingunum eru ikki nóg góðir, bæði tá ið hugsað verður um fakligar og persónligar førleikar sum arbeiðslag og virkisfýsni. Hetta vísa tær hoyringar, Fólkaskúlaráðið hevur havt, eisini greitt. Av tí sama falla nógv fleiri næmingar úr 10. flokki frá í miðnámi borið saman við næmingar, ið koma á miðnám beinleiðis úr 9. flokki.

Í tilgongdini hevur Fólkaskúlaráðið skipað fyri fleiri hoyringarfundum, har lærarar og lestrarvegleiðarar úr miðnámsskúlum hava greitt frá og svarað ítøkiligum spurningum frá Fólkaskúlaráðnum. Eisini hevur ráðið tosað við skúlavegleiðara í 10. flokki, umframt at umboð fyri Nám X saman við Tórshavnar kommunu hava lagt fram eftirmeting av Nám X.

Fólkaskúlaráðið hevur skipað hetta tilmælið soleiðis, at fyrru partarnir eru grundaðir á kanningar hjá Fólkaskúlaráðnum og á hoyringar. Seinasti parturin savnar seg um tey tilmæli, ið Fólkaskúlaráðið mælir landsstýriskvinnuni til at seta í verk.

Fólkaskúlaráðið hevur viðgjørt málið á til samans 7 fundum.

Tórshavn 23. november í 2016.

| | | |
|---|---|---|
| Jenny Lydersen, *samskipari* | Annika Sølvará | Charlotta Thorsteinsson |
| Súsanna Mortensen | Høgni Joensen | Magnus Tausen, *skrivari* |
| | Vagn Foldbo, *formaður* | |

# 1. Verandi skipan við 10. flokki

Fólkaskúlin er ein 9 ára grundskúli og ein 1 árs 10. flokkur. Sostatt er 10. flokkur ikki kravdur partur av grundskúlanum, men tilboð til næmingarnar um eitt eyka skúlaár. Á hvørjum ári heldur stórur partur av næmingunum fram í 10. flokki. Talan er um omanfyri 60% av árganginum. Skúlaárið 2016/17 er talan um 63% av árganginum.

Við verandi skúlabygnaði er trupult at veita øllum næmingunum í 10. flokki fjølbroytt undirvísingartilboð, tí at næmingarnir eru spjaddir í nógvum skúlum kring landið. Søguliga hava tað bara verið Tórshavnar Kommuna og Klaksvíkar kommuna, sum hava samskipað 10. flokkarnar í kommununi.

**Ætlanin við 10. flokki** er at geva næmingunum eitt øðrvísi skúlatilboð við fleiri valmøguleikum og breytatilboðum, har teir fáa umstøður at fyrireika seg til at fara í miðnámsskúla ella arbeiði. 10. flokkur skal eisini vera eitt serligt tilboð hjá teimum, sum ikki eru so væl fyri fakliga.

Ongar lærugreinir eru kravdar í 10. flokki, men hesar lærugreinir skulu standa næmingunum í boði:

Føroyskt, danskt, støddfrøði, kristnikunnleiki, ítróttur, samtíð og enskt.

Eisini kunnu allar vallærugreinirnar sambært § 9, stk. 1 í fólkaskúlalógini vera vallærugreinir í 10. flokki. Harumframt er skipanin í 10. flokki, at næmingarnir sambært § 9, stk. 4 skulu kunnu velja ímillum ymsar breytir, so teir ogna sær ein breiðan førleika innan ymisk evni, sum t.d. tónleikabreyt, ítróttabreyt, sjóvinnubreyt og heilsubreyt, og er tað serliga breytatilboðini, ið hava eyðkent 10. flokk seinastu árini. Mentamálaráðið hevur kannað vallærugreinatilboðið í 10. flokkunum, og vísir tað seg at vera sera ymiskt frá skúla til skúla. Hetta er serliga tengt at næmingatali í 10. flokki, um skúlin skipar samlestur í vallærugreinum í 8., 9. og 10. flokki, og um samstarv er millum 10. flokkar í ymsum skúlum.

**Næmingatalið** er ein grundleggjandi fortreyt fyri, at næmingarnir kunnu velja millum ymsar vallærugreinir og breytatilboð, tí hava nakrir skúlar í fleiri ár skipað fyri samstarvi millum 10. flokkarnar, t.d. Runavíkar skúli og Tofta skúli, Tvøroyrar skúli og Vágs skúli og Skúlarnir í Klaksvík og Fuglafjarðar skúli. Eisini hevur samstarv verið millum Vestmanna skúla, Skúlan á Giljanesi og Sørvágs skúla um 10. flokk, og skúlaárið 2016/17 er samstarv skipað millum Fuglafjarðar skúla, Skúlan við Streymin og Stranda skúla.

Av tí at tað er so stórur munur á næmingatalinum í 10. flokkunum, so er trupult at skipa eina undirvísing við fleiri valgreinum og verkætlanartilboðum í smærru skúlunum, tí tað ber ikki til at manna tilboðini. Næmingatalið hetta skúlaárið er frá 6 næmingum í minsta 10. flokkinum til 192 næmingar í største 10. floks skúlanum.

**Fortreytirnar** fyri bæði breytatilboðum og lærugreinatilboðum er eitt ávíst næmingatal, og tað krevur við verandi skipan eitt samstarv millum fleiri skúlar fyri at kunna bjóða næmingunum hesi tilboð. Hetta var greitt, tá ið verandi skipan við 10. flokki varð samtykt í 1997 og sett í verk í 1998. Breytatilboðini kravdu størri 10. flokseindir. Í uppskotinum til fólkaskúlalógina í 1997 varð tí mælt til, at landið var býtt i 5 skúlafylki. Fylkini vórðu ikki lógarásett, men ístaðin varð lagt upp til samstarv millum kommunur, sum ásett í § 9, stk. 4, at skúlasamstarv kann verða skipað um 10. flokkarnar ímillum fólkaskúlar sínámillum og aðrar skúla-/útbúgvingarformar, vinnulív, almanna-/heilsuverk o.o. viðvíkjandi breytatilboðum, ið kunnu standa næmingunum í 10. flokki í boði.

Ætlanin við ásetingini í § 9, stk. 4 var eisini, at 10. flokkur skuldi hava tilknýti til ungdómsútbúgvingar og vinnulív, so tað var eitt lagaligari skifti frá fólkaskúla til vinnu- og miðnámsútbúgvingar, lærupláss ella arbeiði. Hetta hevur bert eydnast í avmarkaðan mun. Nám X hevur t.d. skipað samstarv við Tekniska skúla og Vinnuháskúlan um breytatilboð.

**Umframt bygnaðarligar broytingar** er neyðugt at viðgera innihald, tímatal og samskipan. Sum víst á, so er tað ein rættiliga stórur partur av næmingunum, sum heldur fram í 10. flokki. Hetta eru næmingar, sum ynskja eitt øðrvísi skúlaár, áðrenn farið verður víðari í skúlaskipanini, næmingar, sum hava ávíst tarn, næmingar, sum ikki halda seg hava nøktandi førleika at fara á miðnám, og næmingar, sum ikki vita, um teir skulu fara víðari í skúla ella í arbeiði.

**Fólkaskúlaráðið hevur viðgjørt spurningin**, um føroyskt, støddfrøði og enskt eiga at vera kravdar lærugreinir í 10. flokki. Hetta eru lærugreinir, sum eru kravdar á øllum miðnámsskúlum, og sum næmingarnir tí helst koma at hava eftir 10. flokk. Harumframt hevur verið viðgjørt, um samtíð ikki eisini skal vera kravd lærugrein.

10. flokkur er umframt at vera fakliga førleikamennandi eisini hugsaður sum eitt búningarár, og í tí sambandi er tað, at samtíð kemur til sín rætt, so næmingarnir fáa størri innlit í samfelagslig viðurskifti og við tí í førninginum eru betur førir fyri at velja rætt eftir loknan 10. flokk. Harumframt hava kanningar ferð eftir ferð bent á, at næmingar vita alt ov lítið um samfelagslig viðurskifti.

Um eindirnar eru nóg stórar, og tímajáttanin er til tað, ber eisini til at førleikabýta næmingarnar, so allir næmingar fáa eina fakliga avbjóðing á teirra støði, og soleiðis kunnu betra um sínar fakligu førleikar og varðveita eitt gott arbeiðslag.

Hetta krevur, at undirvísingartilboðini verða skipað í mun til tørv og áhuga hjá næmingunum. Ongar ásetingar eru um, at næmingar, ið t.d. hava vantandi lesi- og skriviførleika ella vantandi førleika í støddfrøði, fáa serlig tilboð júst á hesum øki. Lógin ásetur, at næmingar ístaðin fyri at fara til próvtøku í 10. flokki, kunnu taka 9. floks próvtøku í 10. flokki.

**Í løtuni eru eingi krøv um ávísar lærugreinir í 10. flokki.** Næmingarnir kunnu frítt velja millum allar lærugreinir, ið verða bodnar út, og eingin lærugrein er kravd. Einasta treyt er, at samlaða tímatalið er minst 28 undirvísingartímar um vikuna. Harumframt er ein kravd verkætlanaruppgáva.

Eftir játtanarskipanini fær hvør 10. flokkur játtaðar 32 undirvísingartímar um vikuna. Innan hesar rammur skal hvør einstakur næmingur hava minst 28 tímar.

**Fleiri av breytatilboðunum megna ikki** at hava fullar floksstøddir á 26 næmingar. Hesar floksstøddir kunnu liggja á t.d. 12 ella 16 næmingar, alt eftir hvussu nógv velja lærugreinina, ella hvussu nógv lærugreinin rúmar. Tess vegna kosta hesir undirvísingartímar lutfalsliga nógv. Munurin millum játtaðar og kravdar undirvísingartímar er tí í stóran mun grundarlag undir, hvussu fjølbroytt skúlatilboð til 10. flokk, skúlarnir kunnu veita.

Av tí at munurin millum játtaðu og kravdu tímarnar er sera lítil, er helst neyðugt annaðhvørt at lækka kravda undirvísingartímatalið hjá næmingunum ella at økja um játtanina til flokkarnar, so fjølbroytnið kann gerast størri.

Miðnámsskúlarnir, vit hava havt til hoyringar, eins og danskar kanningar vísa á, at ein stór avbjóðing í 10. flokki er at menna næmingarnar bókliga eins og at halda fast í einum góðum arbeiðslagi. Hetta eigur tí at styrkjast.

## 2. 10. flokkar skúlaárið 2016/17

Skúlaárið 2016/17 eru til samans 13 skúlar, ið bjóða fram 10. flokk. Í hesum 10. flokkum eru til samans 481 næmingar, sum játtanarliga eru skipaðir í 26 flokkar. Hesir næmingar koma úr einum árgangi við 765 næmingum (Millennium árgangurin), sum er óvanliga stórur. Av hesum árganginum eru tað sostatt 63%, sum ganga í 10. flokki. Tað er rættiliga samsvarandi við hagtøl frá undanfarnum árum, og um borið verður saman við donsk hagtøl yvir 10. fl./eftirskúlar.

**Talva 1. 10. flokkar skúlaárið 2016/17**

| | Árgangir 2016/17 | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| SKÚLAR við 10. fl | 1. fl. | 2. fl. | 3. fl. | 4. fl. | 5. fl. | 6. fl. | 7. fl. | 8. fl. | 9. fl. | 10. fl. | flokkar |
| Eysturskúlin | 28 | 35 | 35 | 24 | 37 | 27 | 27 | 68 | 45 | 192 | 8 |
| á Skúlatrøð | 60 | 67 | 67 | 59 | 74 | 81 | 81 | 92 | 79 | 80 | 4 |
| Skúlin við Streymin | 14 | 13 | 10 | 15 | 15 | 15 | 29 | 39 | 38 | 29 | 2 |
| Fuglafjarðar skúli | 24 | 18 | 22 | 20 | 17 | 25 | 16 | 50 | 34 | 43 | 2 |
| Stranda skúli | 11 | 12 | 18 | 7 | 16 | 11 | 10 | 13 | 7 | 6 | 1 |
| Runavíkar skúli | 33 | 35 | 25 | 33 | 39 | 40 | 41 | 54 | 54 | 39 | 2 |
| Tofta skúli | 23 | 17 | 23 | 16 | 34 | 17 | 18 | 18 | 18 | 13 | 1 |
| Skúlin á Giljanesi | 34 | 34 | 30 | 37 | 34 | 38 | 41 | 31 | 33 | 10 | 1 |
| Vestmanna skúli | 11 | 22 | 20 | 22 | 18 | 21 | 22 | 21 | 18 | 6 | 1 |
| Sørvágs skúli | 13 | 20 | 13 | 22 | 22 | 15 | 15 | 21 | 15 | 9 | 1 |
| Tvøroyrar skúli | 20 | 14 | 25 | 30 | 25 | 28 | 29 | 19 | 20 | 24 | 1 |
| Vágs skúli | 16 | 15 | 19 | 22 | 16 | 17 | 23 | 27 | 27 | 17 | 1 |
| Sandoyar Meginskúli | | | | | | 16 | 21 | 16 | 18 | 13 | 1 |
| **Samanlagt** | **287** | **302** | **307** | **307** | **347** | **351** | **373** | **469** | **406** | **481** | **26** |

**Játtanarliga er skipanin samansett** av nógvum ymiskum smálutum, men yvirskipað kann verða sagt, at er 1 næmingur í økinum, har 10. flokkur nú er skipaður, sum ynskir at ganga í 10. flokki, verður flokkur staðsettur. Í teimum førum, at næmingar hava verið á útoyggj, hevur 10. flokkur verið skipaður, men annars verður hildið fast í verandi 10. flokkum, og nýggir verða ikki settir á stovn.

**Játtanin til sjálva undirvísingina** er roknað til hvønn flokk. Játtanin til 10. fl. er 32 undirvísingartímar um vikuna umframt 13% av næmingatalinum til miðfirraða serundirvísing. Flokkar verða býttir, tá ið næmingatalið kemur upp á 27, 53, 79 osfr.

Játtanin til fólkaskúlan er 304 mió. kr., og næmingatalið er á leið 7.000. Hetta svarar til ein miðal kostnað pr. næming, ið er 43.500,- kr. Men av tí at játtanin fyri ein stóran part verður játtað pr. flokk, og næmingatalið í hvørjum flokki er ógvuliga misjavnt, er tað somuleiðis ógvuliga misjavnt, hvat hvør næmingur kostar. Meðalprísurin fyri ein næming í Nám X í Eysturskúlanum er tí uml. 36.500,- kr. Til samanberingar kann verða gingið út frá, at smæstu eindirnar kosta uml. 4 ferðir so nógv. Tað er tí heilt nógv fíggjarorka, sum við verandi bygnaði í 10. flokki, kundi verið brúkt øðrvísi.
Verður 10. flokkur skipaður í 4 eindir, so sum sett er upp í døminum niðanfyri, og játtanarligi leisturin brúktur, sum nú er galdandi, hevði støðan verið henda:

**Talva 2 – 10. flokseindir sambært tilmæli**

| | Árgangir 2016/17 | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Hugsaðar 10. flokseindir** | **1. fl.** | **2. fl.** | **3. fl.** | **4. fl.** | **5. fl.** | **6. fl.** | **7. fl.** | **8. fl.** | **9. fl.** | **10. fl.** | **flokkar** |
| Eysturskúlin | 28 | 35 | 35 | 24 | 37 | 27 | 27 | 68 | 45 | 192 | |
| Skúlin á Giljanesi | 34 | 34 | 30 | 37 | 34 | 38 | 41 | 31 | 33 | 10 | |
| Vestmanna skúli | 11 | 22 | 20 | 22 | 18 | 21 | 22 | 21 | 18 | 6 | |
| Sørvágs skúli | 13 | 20 | 13 | 22 | 22 | 15 | 15 | 21 | 15 | 9 | |
| Sandoyar Meginskúli | | | | | | 16 | 21 | 16 | 18 | 13 | |
| **10. fl. Suðurst./Sandoy** | | | | | | | | | | **230** | **9** |
| á Skúlatrøð | 60 | 67 | 67 | 59 | 74 | 81 | 81 | 92 | 79 | 80 | |
| Fuglafjarðar skúli | 24 | 18 | 22 | 20 | 17 | 25 | 16 | 50 | 34 | 43 | |
| **10. fl. norður** | | | | | | | | | | **123** | **5** |
| Skúlin við Streymin | 14 | 13 | 10 | 15 | 15 | 15 | 29 | 39 | 38 | 29 | |
| Stranda skúli | 11 | 12 | 18 | 7 | 16 | 11 | 10 | 13 | 7 | 6 | |
| Runavíkar skúli | 33 | 35 | 25 | 33 | 39 | 40 | 41 | 54 | 54 | 39 | |
| Tofta skúli | 23 | 17 | 23 | 16 | 34 | 17 | 18 | 18 | 18 | 13 | |
| **10. fl. eystur** | | | | | | | | | | **87** | **4** |
| Tvøroyrar skúli | 20 | 14 | 25 | 30 | 25 | 28 | 29 | 19 | 20 | 24 | |
| Vágs skúli | 16 | 15 | 19 | 22 | 16 | 17 | 23 | 27 | 27 | 17 | |
| **10. fl. suður** | | | | | | | | | | **41** | **2** |
| **Samanlagt** | | | | | | | | | | **481** | **20** |

Talva 2 er grundað á júst sama játtanarfrymil, sum nú er galdandi. Fíggjarliga merkir hetta, at játtaðir verða undirvísingartímar til 20 flokkar og ikki 26 flokkar, sum gjørt verður skúlaárið 2016/17. Henda broyting hevði leysgivið uml. 3 mió. kr., um játtanargrundarlagið annars var tað sama. Fakliga útboðið til næmingarnar hevði ikki lækkað – tvørturímóti, tí hesar 4 eindirnar høvdu fingið næmingatal og harvið tímajáttan, ið letur upp fyri fleiri breytatilboðum og fakligum samansetingum enn áður.

Nám X í Havn hevði ikki vaksið stórvegis. Talan er um 1 flokk afturat. Eftir er so Suðuroyggin, ið neyvan kann samskipast við annað 10. flokstilboð aðrastaðni í landinum.

**Fíggjarliga atlitið** eigur sjálvandi at verða tikið við í støðutakanina viðv. 10. fl., men kann ikki standa einsamalt ella vera einasta grundgevingin fyri samanleggingum. Nógv størri týdning hevur tað, at skal 10. flokstilboðið gerast fjøltáttað, við eitt nú breytum, er neyðugt við ávísum næmingatali. Kritiska næmingatalið tykist liggja um 100 næmingar, og skal helst vera omanfyri tað.

## 3. Hoyringar

Fyri at fáa innlit í viðurskifti viðv. 10. flokki sæð úr fólkaskúla og miðnámi hava hoyringarfundir verið við umboð fyri miðnám og fólkaskúla, lærarar, lestrarvegleiðarar og leiðslu í fólkaskúla.

Fleiri 10. flokkar í landinum er so smáir, at bara fá frábrigdi eru borið saman við 9. fl. Fyri at fáa fjølbroytni er neyðugt við rættiliga høgum næmingatali, so at tímajáttanin letur upp fyri ymiskum breytum. Í hesum sambandi er samstarv ímillum nakrar 10. flokseindir, og aðrar eru í eini so passaligari støðd (Klaksvík og Nám X), at fjølbroytni ber til.

**Viðmerkingar frá umboðum fyri fólkaskúlan**

Í miðal fara um 60% av 9. floks næmingum í 10. flokk. Í pørtum av landinum fara heilt upp í 80% av næmingunum í 10. flokk. Uml. ¼ av teimum, ið ikki fara í 10. flokk, fara í miðnám og fleiri fara á eftirskúla.

Grundgevingin at fara í 10. flokk er, at tað gera vinfólkini, at tað er væl umtókt, og har er ikki so nógv skúlating at gera. Trivnaðurin er góður, og sosiala umhvørvið er gott, tey brúka orðið "slappa av" í týdninginum av, at hetta er nakað, sum tey tíma, og tey velja breyt út frá áhuga. Víst verður eisini á, at best hevði verið við serstøkum 10. floks eindum. Í tí sambandinum verður vist á, at umboðanin í skúlastýrinum eigur at verða umhugsað, so at vinnan fær eitt umboð, heldur enn at kommunan hevur tvey umboð.

Úrvalið av vallærugreinum og breytum tykist vera í lagi. Tó kundi verið gott at fingið bjóðað hægri støði í støddfrøði og alis - og evnafrøði umframt lægri støði í føroyskum, men tímajáttanin er avmarkandi.

Samstarvið við uttanhýsis partar virkar framúr væl á summum breytum, og aðrar breytir hava at kalla einki samstarv. Her kunnu skúli og vinnulív í felag gera munandi meira.

Skúlavegleiðingin tykist ikki serliga sterk. Næmingarnir vísa heldur á flokslæraran og aðrar lærarar, tá ið viðvíkur víðari vali. Tillutaða tíðin hjá skúlavegleiðarum røkkur ikki, hon fer heldur til at finna starvslærupláss. Sambært næmingunum gevur starvslæran góða meining.

Úr 10. fl. fara uml. 80% á miðnám/yrkisnám. Fleiri gentur fara á gymnasialt miðnám og fleiri deingir á yrkismiðnám. Skiftið úr 10. flokki í miðnám er ein avbjóðing hjá nógvum næmingum.

Skúlaárið 2016/17 eru 193 næmingar innskrivaðir í Nám X. Tað er nakað av tí mesta nakrantíð. Nám X hevur breytaskipan. Hetta er ein skipan, ið er skipað við íblástri úr Tekniska skúla. Harumframt hevur Nám X samstarv við Tekniska skúla, og tríggjar breytir eru fast á Tekniska skúla hvørja viku. Talan er um uml. 36 næmingar tilsamans. Í Nám X eru breytatilboðini skipað soleiðis:

Breyt 1: Undir breyt 1 eru tilsamans 8 ymiskar breytir í at velja, og hvør breytin hevur 10 undirvísingartímar um vikuna. Breyt 1 er grundarlagið undir verkætlanaruppgávuni – próvtøka er annars ikki á breyt.

Breyt 2: Undir breyt 2 eru tilsamans 7 ymiskar breytir í at velja, og hvør breytin hevur 10 undirvísingartímar um vikuna. Málbreyt og Vísindabreyt eru próvtøkubreytir – hetta svarar til víðkað skeið.

Umframt breytir bjóðar Nám X øll valfak, enskt (Cambridge) og eisini ávís alternativ fak t.d. teldufrøði og hugaítrótt (talv/bridge) umframt Betri lesing (uml. 5-6 næm.). Næmingarnir skulu velja minst 8 tímar sum valfak = 28 tímar um vikuna til samans. Nógv flestu næmingar hava júst 28 undirvísingartímar um vikuna.

Umsóknarfreistin til Nám X fylgir upptøkuni til miðnám – 15. mars. Leiðslan er úti á øllum teimum skúlunum, ið hava næmingar, ið eru í upptøkuøkinum. Tosað verður við hvønn einstakan næming, ið søkt hevur, og fakynskini verða gjøgnumgingin.

**Viðmerkingar frá umboðunum fyri miðnám:**
Tá ið borið verður saman ímillum 9. - og 10. flokk, kann verða staðfest, at næmingar, ið koma úr 9. flokki, hava høgt miðaltal og halda á við høgum miðaltali. Tað eru nógv fleiri gentur, ið standa seg væl, men tó eru toppstudentarnir ofta dreingir. Tað eru fleiri gentur, ið søkja og koma inn á miðnám. Tað eru eisini fleiri gentur, ið søkja úr 9. flokki.

Næmingafráfall á miðnámi er ikki nýtt fyribrigdi. Til dømis byrjaði ein flokkur skúlaárið 2015/16 við 26 næmingum, men eru nú 16 = fráfall á 10. Eitt annað dømi vísir fráfall á 7 næmingar. Gjøgnumgangandi er galdandi, at næmingafráfallið er størri hjá næmingum, ið hava tikið 10. flokk enn hjá næmingum, ið eru komnir úr 9. flokki. Nógv fleiri dreingir falla frá. Fyri yrkisnám er gongdin stórt sæð tann sama, at næmingarnir úr 9. flokki falla ikki líka ofta frá. Næmingarnir tykjast miðvísari, dugnaligari og meiri avkláraðir.

Hugtakið "skúlatroytt" fatar um nógv ymisk viðurskifti, og nógv bendir á, at 10. flokkur ger hetta verri. Hetta er ikki nøkur nýggj gongd, men hevur verið galdandi í nógv ár.

Tað eru greiðar ábendingar um, at ávísir skúlar hava vælvirkandi 10. flokk, og aðrir skúlar hava ikki vælvirkandi 10. flokk. Hetta sæst aftur ár eftir ár. Næmingar, ið hava havt fakligar avbjóðingar ella vánaligt arbeiðslag, og hava fingið sett krøv, hava fingið nógv burturúr í 10. flokki. Líkasæla er tað ringasta og skaðiligasta. Kenslan av, at tað er líka mikið, um ein er til staðar ella letur inn uppgávu, skal ikki vera. Harafturat eru ábendingar um, at próvtølini úr fólkaskúlanum siga ikki, hvussu støðan er, t.d. koma næmingar inn við próvtølum, ið als ikki svara til tað, teir duga.

Stóra fráfallið er ómetaliga stór avbjóðing og óheppið fyri alla skipanina og einstaka næmingin. Orsøkirnar til hetta eru nógvar, og víst verður m.a. á, at ov nógvir næmingar koma inn á gymnasialt miðnám, sum ikki hava neyðugar fakligar og arbeiðsligar førleikar. HTX kundi verið ein partur av eini loysn. Næmingar velja skeiva leið og kemst hetta uttan iva av, at lestrarvegleiðingin er ikki nøktandi. Tí koma alt ov nógv inn á gymnasialt miðnám heldur enn yrkisnám.

Í summum førum vísir tað seg, at tíðin var ikki tann rætta hjá næmingunum at koma á miðnám. Hesir næmingar koma tó aftur. Ofta longu árið eftir, og tá eru tey munandi miðvísari og klárari og koma ígjøgnum miðnám við nøktandi úrslitum.

Eitt annað vandatekin, sum ger seg galdandi, eru persónligir trupulleikar. Hetta er sera nógv økt seinnu árini. Ikki minst millum dreingirnar. Tað skal tó havast í huga, at hetta møguliga er eitt tekin um, at deingirnir nú eftir øllum at døma tora at koma fram við trupulleikum sínum. Áður høvdu teir hesar trupulleikar fyri seg sjálvar.

## 4. Skipanir í øðrum londum, kanningar, tilmæli o.a. viðv. 10. flokki:

Danski eftirmetingarstovnurin Eva, hvørs endamál er at granska og menna góðskuna av dagtilboðum, skúlum og útbúgving, hevur gjørt eina kanning í trimum pørtum. Kanningin bleiv liðug í apríl 2016. Kanningin hevur 4 boð, hvat dentur eigur at verða lagdur á, fyri at styrkja 10. flokk.

**1. Brúka 10. fl. sum brúgv til víðari útbúgving**

10. flokkur hevur nógvar møguleikar at byggja eina góða brúgv til bæði miðnám og yrkisnám. Tað eru í dag fleiri tiltøk, sum leggja dent á at skapa betri samband ímillum fólkaskúlan og miðnám.

**2. Set høgar og týðiligar væntanir til framgongd/framstig hjá næmingunum**

Næmingar í teimum kommunalu 10. flokkunum skilja seg í fleiri mátar negativt frá næmingunum, sum enda fólkaskúlan aftaná 9. fl. ella fara í 10. fl. á eftirskúla.

Næmingarnir í teimum kommunalu 10. flokstilboðunum hava lægri próvtalsmiðal enn næmingar, sum enda aftaná 9. fl. ella fara á eftirskúla.

Gransking vísir, at hægri væntanir hava serligan týdning fyri næmingar í teimum kommunalu 10. flokkunum. Tað er avgerandi, at lærarar hava týðiligar væntanir til næmingarnar, geva javnan aftursvar og stuðla teimum eftir tørvi. Tað er eisini umráðandi, at lærararnir geva næmingunum avbjóðingar og syrgja fyri framstigum í læringini.

**3. Ikki brúka "vinarlags-ávirkan" sum undanførslu**

Í hugtakinum "vinarlags-ávirkan" liggur, at floksfelagaðar hava ávirkan hvør á annan. Tann sterki næmingabólkurin kann lyfta flokkin. Tað øvugta kann eisini koma fyri. Í 10. flokki eru mangan sterkastu næmingarnir farnir á miðnám og tí ikki har at lyfta veikaru næmingarnar.

Mikkel Haarder stjóri í EVA sigur; *at í eini samanseting av næmingum, har fleiri hava fakligar og málsligar avbjóðingar, kunnu vera avmarkaðir møguleikar fyri at lyfta ein næmingahóp í 10.fl.*

*Vinarlags-ávirkanin má tó ikki blíva ein umbering, fyri ikki at gera nakað við at lyfta flokkin. Samansetingin av næmingunum má heldur gera, at tað verður sett eyka inn.*

**4. Læra av teimum góðu dømunum**

Vegurin fram er eisini, at lærarar í teimum 10. flokkunum, ið hava góðar royndir við at brynja næmingar til at halda á fram til miðnám, vísa fram arbeiðshættir sínar. Tað er eisini brúk fyri meira vitan um góða undirvísing í 10. fl.

Í løtuni finst eingin skipað vitan um, hvussu undirvísing í teimum 10. fl., sum klára seg væl, verður skipað og løgd til rættis.

Royndir í Århus kommunu vísa, at fyri at skapa eitt dynamiskt og mennandi ungdóms- og undirvísingarumhvørvi, er minstakravið til 10. flokseind 100-200 næmingar.

Eisini verður skotið upp, at staðseta 10. flokk aðrastaðni enn í fólkaskúlanum. Hetta fyri at undirstrika, at 10. flokkur er byrjanin til víðari útbúgving og ikki endin á fólkaskúlanum.

**Leinkja til tíðindini "4 bud på en bedre 10. klasse":** https://www.eva.dk/e-magasinet-evaluering/2016/evaluering-april-2016/4-bud-pa-en-bedre-10.-klasse

**DPU – Nordal, Qvortrup og Egelund**
Nýggj gransking frá DPU, sum Thomas Nordal, Lars Qvortrup og Niels Egelund hava staðið fyri, staðfestir, at 10. flokseindir, ið eru skipaðar fyri seg, standa seg munandi betur, enn tá ið 10. flokkur er partur av skúlanum annars. Hetta sæst aftur sosialt, fakliga og í trivnaðinum hjá bæði næmingum og lærarum. Lærarar eru fyri tað nógva burturav í hesum eindum, og eindirnar hava lagt seg eftir at hava gott samband við miðnámsskúlar og onnur, har næmingarnir skulu halda fram eftir loknan 10. flokk.

Tað, at eitt serligt læruumhvørvi verður skapt í 10. flokseindini, hevur ógvuliga góða ávirkan á næmingar og lærarar, tí talan er ikki um framhald av tí, ið hevur verið seinastu 9 skúlaárini, men heldur um nýggja byrjan. Møguleikarnir hjá næmingunum at standa vinnu- miðnámsútbúgving verða munandi styrktir í 10. flokseindum, ið eru fyri seg, borið saman við 10. flokseindirnar, ið eru partur av fólkaskúlunum annars. Men granskingin staðfestir eisini, at tað eru stórir munir á dygdini á kannaðu 10. flokseindunum. Tað er sostatt ikki trygd fyri dygd, at eindirnar eru fyri seg. Niðurstøðan hjá granskingarbólkinum hesum viðvíkjandi er:

*"Det er muligt at identificere en kommune, der konsekvent ligger højt, mens der er lidt variation i lave placeringer for de undersøgte funktionsområder. Det skal også noteres, at der ikke er sammenhæng mellem disse forskelle og kommunernes socialøkonomiske situation. Det må derfor antages, at forskellene beror på forskelle mellem skolekultur (ledelse, organisering, lærerkompetencer osv.). "*

**Keldutilvísing:** http://ncs.au.dk/fileadmin/NCS/Udgivelser/Rapport_10._klasseskoler_i_Program_for_Laeringsledelse.pdf

**Øðrvísi skipan í Noregi**
**"Grunnskole"** er heitið á kravda 10. ára skúlagongdini fyri børn í aldrinum 6-16 ár. Grundskúlin fevnir um allar barna- og ungdómsskúlarnar í Noregi. Grundskúlin er skipaður í "Opplæringslova". Kommunurnar hava ábyrgd av rakstrinum av almennu grundskúlunum, men privatskúlar ella frískúlar eru eisini. Gongdin í Noregi er, at alt fleiri skúlar fevna um allan aldursbólkin frá 1. – 10. flokk við felags leiðslu og lærarahópi.

Fráfaringarroynd er sum oftast eftir 10. skúlaárið, men kann verða tikin, nær tað skal vera, um so er, at næmingurin er avlærdur í kravdum pensum í fakinum.

Í Noregi er skipanin so statt ikki, at serstakir 10. flokkar eru skipaðir.

**Miðnám:**
Næmingar, ið hava staðið grundskúlan, hava rætt at søkja víðari inn á 3-ára miðnám. Miðnámslesturin kann vera longur enn 3 ár.

Vanliga treytin er, at miðnámslesturin verður tikin í ikki meira enn 5 ár ella 6 ár, um talan er um samskipað miðnám fyri lærlingar. Hetta skal verða gjørt, áðrenn næmingurin fyllir 24 ár.

Næmingar við serligum tørvi kunnu taka miðnám í 5 ár heldur enn 3 ár. Sakkunnleiki skal hava mett um støðuna hjá einstaka næminginum, áðrenn hesar skipanir verða settar í verk. Serskipanir eru eisini fyri teir næmingar, ið nýta teknmál, ella hava annað móðurmál enn norskt. Eisini skal fylkiskommunan bjóða teimum næmingum, ið ikki megna at fylgja undirvísingini, annað tilboð. Fylkiskommunurnar hava ábyrgdina av skúlagongdini og skipa tilboðini grundað á krøv frá útbúgvingardepartimanginum.

**Keldutilvísing:** https://lovdata.no/dokument/NL/lov/1998-07-17-61#KAPITTEL_2

## 5. Samstarv og samskipan við miðnám og arbeiðsmarknað

**Skiftið frá fólkaskúla til miðnám og arbeiðsmarknað**

Skiftið frá fólkaskúla til miðnám og arbeiðsmarknað er eitt stórt stig fyri flestu næmingar. Tað eru nakrir næmingar, sum tíðliga og greitt vita, hvat og hvar teir vilja aftaná fólkaskúla. Hetta eru serliga teir næmingar, sum velja at fara úr 9. flokki í miðnám. Fleiri næmingar ivast hinvegin langt inn í 9. og eisini í 10. flokk, hvagar leiðin skal ganga. Tað er greitt, at her er tørvur á enn betri kunning um møguleikar og tilboð, frá fólkaskúla, miðnámi og frá vinnulívi, til tess at geva næmingunum ítøkiligari innlit og amboð at velja næstu stigini á lívsleiðini. Hendan kunning skal gevast bæði í 9. og 10. flokki.

Mett verður, at tað er tørvur á, at næmingar fáa ítøkiligt samband við ætlaða miðnámsskúlan seinastu lestrarhálvuna í fólkaskúlanum og saman við skúlanum velja møguligar breytir og leggja eina ætlan fyri skiftinum. Endamálið er at fáa greiðari fatan av, hvør breyt er mest hóskandi miðnámi, hvat krevst her og at fyrireika seg sálarliga.

## 6. Gransking og kanningar

Í greiningararbeiði okkara staðfestu vit millum annað, at tað tykjast vera munir á valunum hjá næmingunum frá flokk til flokk, árgang til árgang, millum gentur og dreingir og landafrøðiliga, hvørt tey fara á miðnám aftaná 9. flokk ella fara í 10. flokk ella eftirskúla, og hvar tey síðani fara aftaná 10. flokk. Hetta er tó ikki skjalprógvað við skipaðum hagtølum fyri alt landið, hóast einstøku skúlarnir í stóran mun liggja inni við viðkomandi upplýsingum. Tað hevði verið eitt sera hent amboð til gransking og til politiska støðutakan at fingið skrásett allar upplýsingar um næmingarnar í skiftinum frá 9. flokki til 10., eftirskúlar, miðnám og vinnu.

Tað kom eisini fram, at tað er ójavnt, hvussu stórt fráfallið er á ymsu breytunum og árgangunum. Eisini her høvdu hagtøl verið kærkomin til at kanna, hvørt tað eru ávís mynstur at hóma.

Hetta eru bert tvey dømi úr rúgvuni, sum vísa, at eisini á hesum økinum er stórur tørvur á hagtølum, kanningum og gransking í føroyskum viðurskiftum og umstøðum.

## 7. Tilmæli/niðurstøður

Í hesum partinum verður tikið samanum tey mál, ið Fólkaskúlaráðið hevur viðgjørt í sambandi við 10. flokk.

Fólkaskúlaráðið hevur hesi tilmæli:

**1. tilmæli – Varðveita 10. flokk**

Fólkaskúlaráðið er samt um, at 10. flokkur eigur at verða varðveittur. Hetta er grundað á, at tað eru nógvir næmingar, ið eru ikki førir fyri at fara úr 9. flokki á miðnám ella á arbeiðsmarknaðin. Hesir næmingar hava tørv á at verða mentir fakliga, sosialt og menniskjaliga. Men mælt verður til, at innihaldið í 10. flokki eigur at vera nógv meiri samskipað við tað, ið skal henda hjá næmingunum eftir loknan 10. flokk.

**2. tilmæli – Skipa 10. floks skúlar**

Mælt verður til, at 10. floks skúlarnir verða 4 í tali, grundað á næmingatal, landafrøði, karmar osfr.

Mælt verður til, at § 4, stk. 2 í lógini verður broytt soleiðis, at staðfest verður, hvørjar 10. flokseindirnar eru, og hvar tær eru staðsettar.

Mælt verður til, at fyrisitingin í Mentamálaráðnum fyrireikar lógarbroytingarnar til at leggja fyri løgtingið, so nýggj skipan kann verða sett í verk. Henda tilgongd skal verða samskipað við skúlaleiðslur, kommunur og fakfelag.

Av tí at munurin millum játtaðu og kravdu tímarnar er sera lítil, er helst neyðugt annaðhvørt at lækka kravda undirvísingartímatalið hjá næmingunum ella at økja um játtanina til flokkarnar, so fjølbroytnið kann gerast størri.

Mælt verður tí til, at tímajáttanin, sum nú verður nýtt til 10. flokkarnar, verður varðveitt á fólkaskúlaøkinum til m.a. at styrkja tær fýra 10. flokseindirnar, sum mælt verður til at skipa, so at undirvísingarliga tilboðið kann verða styrkt munandi.

Í sambandi við skúlabarnaflutning er neyðugt at fáa eina skipan fyri 10. fl., sum minnir um hana, sum Studni hevur fyri miðnámið.

**3. tilmæli – Innihaldsligar broytingar**

Mælt verður til, at føroyskt, enskt og støddfrøði verða kravdar lærugreinir, sum enda við próvtøku og at samtíð verður kravt undirvísingarevni í 10. fl.

Mælt verður til, at ásett verður undirvísingartilboð fyri næmingar við vantandi førleika í lesing og skriving og undirvísingartilboð fyri næmingar við serligum avbjóðingum, umframt at skúlin kann gera undantak frá kravdu lærugreinunum fyri næmingar við serligum avbjóðingum.

10. flokkur er endin á fólkaskúlanum og sostatt ein útskúlingarflokkur, og hetta eigur at síggjast aftur í skipanini, so at samstarv er við vinnu- og miðnámsskúlar og arbeiðsmarknaðin. Harumframt skal styrkt skúlavegleiðing í 10. flokki tryggja, at næmingarnir velja bæði lærugreinir og breytir við atliti at áhuga og førleika, og sum ger teir búnar at fara á miðnám, í læru ella á arbeiðsmarknaðin.

Mælt verður til, at skúlavegleiðingin í fólkaskúla og lestrarvegleiðingin miðnámi verður betri samskipað, og at ein meiri yvirskipaður felags leistur verður lagdur fyri innihaldinum í vegleiðingini.

10. flokkur eigur sum liður í fólkaskúlanum framvegis at verða knýttur at einum fólkaskúla ella sum sjálvstøðugur skúli í fólkaskúlahøpi, sbrt. § 4, stk. 2 og 3. *Sí eisini 2. tilmæli.*

**4. tilmæli - Týðiligar væntanir til framgongd/framstig hjá næmingunum**

Mælt verður til, at tað verður krav í øllum 10. flokkum, at ein ítøkilig ætlan verður løgd fyri hvønn einstakan næming, so at neyðug framstig kunnu verða nádd. Henda ætlan skal stíla høgt og fevna um faklig mál, arbeiðslag, virkisfýsni, mál í víðari lestri osfr., so at næmingurin mennir seg til víðari tilgongdina eftir loknan 10. flokk. Innihaldið í 10. flokki eigur framvegis at bróta frá tí, ið fólkaskúlin annars bjóðar við m.a. breytatilboðum, men alt innihald eigur at verða grundað á greið krøv og væntanir umframt víðari tilgongd fyri eyga.

**5. tilmæli – Gransking:**

Í arbeiðinum hjá Fólkaskúlaráðnum, hava vit saknað føroysk granskingarúrslit, sum vit kundu helt okkum til. Her er at kalla einki at finna, og tað er galdandi fyri allan fólkaskúlan og ikki serstakt fyri 10. flokk.

Mælt verður tí til, at miðvís og skipað gransking á fólkaskúlaøkinum verður raðfest og stuðlað við fígging á løgtingsfíggjarlógini. Mælt verður til at játta pening til Námsvísindadeildina á Fróðskaparsetrinum og/ella at oyramerkja játtan til Granskingargrunnin til endamálið. Talan eigur bæði at vera um játtan til smærri kanningar og útgreiningar, sum kunnu gerast av ymsum fakfólkum við fakligari vegleiðing frá granskarum, og um granskingarverkætlanir, bæði 1-2 ára verkætlanir og 3 ára ph.d.verkætlanir.

Um talan verður um játtan til Granskingargrunnin, verður mælt til at brúka sama leist, sum verður nýttur til fæið úr Sjukrakassagrunninum, tvs. at játtanarmyndugleikin setir leiðreglur fyri, hvat játtanin kann nýtast til, at ein faknevnd verður sett at gera tilmæli um stuðul og annars at fylgja mannagongdunum hjá Granskingargrunninum fyri verkætlanir.

Mælt verður eisini til at umhugsa at niðurleggja verandi Fólkaskúlagrunn og nýta fæið úr Fólkaskúlagrunninum til omanfyrinevndu raðfestingar av gransking. Í løtuni er tøka árliga játtanin, tað er rentuavkastið av fænum, so lítil, at hon ger ov lítlan mun. Tað eru ikki útlit fyri, at hendan støðan fer at broytast munandi í bræði.